Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 30. september 2005



**Sjótaim 1:7**

Hvør dugir best at undirhalda - politikarar, kokkar, vanlig sjónvarpsfólk og badmintonspælarar luttaka. Farið verður undir vetrarskránna hjá SvF í hesi vikuni. Hetta sæst aftur m.a. í teimum mongu føroysku sendingunum, ið aftur eru á skránni. T.d. kunnu nevnast Ekkó, MT, Agurk, kjakið og ferðarøðin, í níggju pørtum, Gellur kring knøttin.

**Fríggjadag 30. kl. 19.00**





**Ekkó - Røddir úr tøgnini**

Tað at vera samkyndur í Føroyum hevur altíð verið umgyrt av tøgn. Nógv samkynd eru tí flutt av landinum og liva aðrastaðni eitt lív í opinleika. Í sendingini hitta vit m.a. tvey samkynd, sum bæði mæla til ymsar broytingar í Føroyum. Vit hitta eisini umboð fyri eina samkomu og ein prest, sum tosar um samkynd í mun til Bibliuna.

**Sunnudag 2. kl. 20.00**

**Branson ræður**

Branson hittir luttakararnar fyri fyrstu ferð í heimi sínum í Oxford í Onglandi. Teir verða býttir í tveir bólkar, og avbjóðingin bíðar. Ein kilometur uppi yvir teimum sveima tvær luftballónir og millum tær er ein planki. Milliarderurin Sir Richard Branson hevur valt 16 luttakarar út til ein ævintýrkendan leik. Vinnarin fær eitt starv og eina mill. $ frá Branson.

Leygardag 1. kl. 19.00

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**